# HEILSANIR





**Til okkara fittu junifyllarar**
Lítla didda 5. juni, Miriam 15. juni og Anny 24. juni. Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum.
**Kærastu heilsanir frá ommu og abba**



**Góði elskaði Viggoabbi**
Hjartaliga tillukku á 75 ára degnum. tað sæst ikki á tær. Takk fyri alt, tú og omma eru fyri okkum øll.
**Ynskja abbabørnini**





**Góði Levi**
Lukku og gleði á tínum føðingardegi 24. juni. Og ein heilsan til Filip og Johannes, ið fylla skjótt. Jesus pápi signi tykkum. Vit síggjast.
**Ynskja omman og abbin í Danmark**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Vit elska teg.
**Emil, pabba og lítla diddan**



**Góði Remi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Góða eydnu við róðrinum á jóansøku.
**Ynskja mamma og babba**



**Góði fitti Hjalti**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Gleða okkum at koma í føðingardag.
**Heilsan mostir og gubbi í Klaksvík**



**Góða Heidi**
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum tann 22. juni. Vit gleða okkum til leygardagin. Ein góðan dag og alt gott í framtíðini.
**Ynskja mamma og babba**



**Kenna tit hendan maskin-meistaramann**
Góði babba. Eg og mamma ynskja tær hjartaliga tillukku við útbúgvingini. Endiliga flytir tú heim aftur til okkara at búgva. Vit elska teg. Eisini ein heilan til Karl.
**Heilsan Levi**



**Góði allarbesti og fittasti stóribeiggi í verðini**
Vit báðir ynskja tær hjartaliga tillukku við tínum fyrsta runda degi 24. juni. Vónandi fær tú ein góðan dag. Vit gleða okkum. Vit eru soooo góðar við teg. Muss og klemm.
**Sigrid og didde**



**Góði elskaði Hjalti**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Harrin signi framtíð tína.
**Ynskir omma í Klaksvík**



**Góði Remi**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Tú ert ein óførur róðursmaður. Vit ynskja tær og manningini umborð á Sundabátinum góða eydnu á jóansøku.
**Ynskja Joan og Bárður**



**Góði Johannes**
Tú mást hava ein góðan føðingardag í Danmark. Og ein føðingardagsheilsan til Filip og Levi. Vit koma at sakna tykkum.
**Ynskja Sonja og Finnur**



**Góða mostur, miss 13**
Hjartaliga tillukku við studentspróvnum. Takk fyri at tú ert so góð við meg. Muss og klemm.
**Heilsan Rebekka**

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ______________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ______________________________
Bústaður: ______________________________
Bygd/býur: ____________ Tlf.: ____________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<